# Ella, Birgir og Amnesty fáa ”Ársins heiðursløni r”

**Annað árið á rað letur Miðlahúsið í Vágsbotni tríggjar heiðursløni r til einstaklingar ella felagsskapir, sum m.a. onkursvegna hava gjørt nakað gott fyri onnur. Í dag klokkan 16 verða heiðursløni rnar handaðar í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Tey, sum fáa hesar ársins heiðursløni r, eru: Ella Müller, Birgir Enni og Amnesty International, Føroya Deild.**







Ársins kjakvirðisløn:

## Amnesty International, Føroya Deild

**Grundgeving:**

Amnesty International, Føroya Deild fær "Ársins kjakvirðisløn" fyri at hava stimbrað eitt sakligt og viðkomandi alment orðaskifti í samfelagnum og á tann hátt styrkt fólkaræðið og framsøgufrælsið. Amnesty hevur sett fokus á stórar og týðandi spurningar, mál av almennum áhuga og elvt til eitt gott, sakligt og upplýsandi orðaskifti um hesi viðurskifti. Amnesty hevur varpað ljós á grundleggjandi altjóða mannarættindaspurningar so sum deyðarevsing, loftvegis fangaflutning til lond, sum loya avhoyring við pínslu, fangalegur og tilvildarliga revsing uttan lóg og dóm víða um heimin. Eisini hevur Amnesty International. Føroya Deild alment tikið til umrøðu álvarsamar samfelagsspurningar her í Føroyum og birt upp undir orðaskifti, ið er týðandi fortreyt fyri nútímans fólkaræði.

Ársins maður:

## Birgir Enni

**Grundgeving:**

Birgir Enni fær heiðurin ”Ársins maður” fyri at duga at ansa, finna og vísa á møguleikar í tilfonginum og náttúrini kring okkum. Hann hevur á ein sera fyrimyndarligan hátt víst sínum egnu landsmonnum og fremmandafólki virðini í hesum - ein góður umboðsmaður fyri land og fólk. Allir teir sansir, sum í okkum menniskjum eru íbornir, hava tað gott saman við Birgiri. Føroyingar og útlendingar kunnu hoyra, nema, síggja, smakka og lukta alt tað góða, sum í veruleikanum er sjálvsagt, men tó tykist so sjáldsamt á røkka, í einum skundmiklum gerandisdegi.

Ársins kvinna:

## Ella Müller

**Grundgeving:**

Ella Müller fær heiðurin "Ársins kvinna" fyri sítt brennandi virkisfýsni sum stuðul og stigtakari á mongum mótum í samfelagnum. Hon útynnir eitt breitt ósjálvsøkið virkið, har hon sær tørvin. Hon er virkin í Kvinnuhúsinum hjá fólki í neyð, í ALV hjá fólki við tvørleikum, og hon er stuðul og vegleiðari hjá børnum og ungum sum undangongufólk í Náttarravnunum og sum stigtakari til tiltøk um eitt nú rúsevnismisnýtslu og happing. Alt virki hennara er sjálvboðið, og frá øllum síðum koma afturboð um, at virksemið hjá Ellu ger mun.

*Tvær dómsnevndir hava gjørt av, hvør skal fáa heiðursløni rnar. Tey hava valt millum innkomin uppskot.*

*Í dómsnevndini fyri Ársins mann og Ársins kvinnu eru:* Eyðun Andreassen, fólkalívsfrøðingur (formaður), Jóhanna á Bergi, stjóri á Faroe Ship, Andras Róin, samfelagsfrøðingur og Esther Djurhuus, pedagogur á Landssjúkrahúsinum.

*Í dómsnevndini fyri Ársins kjakvirðisløn eru:* Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri í Mentamálaráðnum, (formaður) Karin Kjølbro, leiðari á Kriminalforsorgini, Annleyg Lamhauge, deildarleiðari á Menningarstovuni og Jón Brian Hvidtfeldt, útvarpsmaður.

*Tað er Miðlahúsið, sum skipar fyri tiltakinum “Ársins heiðursløni r”, og Føroya Banki stuðlar tiltakinum. Tiltakið er alment.*

# Borgarstjórin hevur ikki tørv á parkeringsplássi

**- Sum tey flestu vita, so gangi eg fyri tað mesta, so eg havi ikki tørv á nøkrum serligum parkeringsplássi, sigur Heðin Mortensen, ið heldur málið um serrættindi, at parkera á Vaglinum er blást upp.**

PARKERING

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



- Eg vil sláa fast beinanvegin, at eg havi ongan tørv á at parkera uttan fyri Ráðhúsið. Tað, sum hetta málið snýr seg um, er, at vit hava ein bil, ið hoyrir til Ráðhúsið. Onkuntíð brúki eg hann, men sum tey flestu vita, so gangi eg fyri tað mesta. Annars verður hann m.a. brúktur av húsavørðunum. Her gongur alt við full drøn í Ráðhúsinum, og tí er nógv tilfar, ið skal í og úr húsinum. Tað er í av- og áskipanini av hesum tilfari, at vit ynskja at hava ein lepa, ið ger, at vit kunnu parkera ein hálvan tíma ella eitt korter eyka, sigur Heðin Mortensen við Sosialin.

Men hevur handilslívið í Miðbýnum ikki somu trupulleikar, tá tað snýr seg um av- og áskipan og átti eitt nú Handilskjarnin ikki at fingið somu serrættindi, sum Ráðhúsið nú vil hava?

- Hetta er ikki eitt mál, ið eg havi á mínum borði, so eg veit ikki hvørji ynskir, ið handlarnir hava. Men í londunum rundanum okkum eru serlig tíðarskeið, har av- og áskipan er loyvd, sigur Heðin, ið tó sigur, at hann hevði verið til reiðar at lurta, um handlarnir í Miðbýnum hava líknandi ynskir.

- Tað kundi ongantíð folli mær inn, at vilja havt tílík serrættindi til mín sjálvs, sigur borgarstjórin avgjørdur. Hann vísir á, at hetta er eitt mál, fyri ferðslunevndina, og at tað er løgreglan, ið eigur síðsta orðið.

- Orsøkin til, at tað nú kemur fyri á býráðsfundi, er at ein ávísur býráðslimur ynskir at skrúva málið upp, sigur Heðin Mortensen.

Viðvíkjandi atfinningunum, um at íbúgvarnir í gomlu Havnini fyri nøkrum árum síðan, fingu at vita, at serrættindi ikki longur vórðu givin, vísir Heðin Mortensen á, at hetta vóru fleiri ár síðan, og at hetta ikki er galdandi í dag. Hann vísir á, at t.d. hava íbúgvarnir kring SMS serrættindi at parkera, av tí at tíðaravmarking er har.